gult12 cyan12 magenta12 svart12



Av motorvegi á landsveg:

# Gott keyp ella vágið spæl

BRÚKTIR BILAR
*Rúnar Reistrup*

Tað rennur ein javnur streymur av brúktum bilum úr Týsklandi til Føroya. Nógv fólk velja heldur at keypa sær ein seks ára gamlan eksklusivan bil beinleiðis úr Týsklandi fyri hálvtannaðhundrað túsund enn ein nýggjan og ikki so fínan bil frá føroysku bilasølunum fyri sama prís. Hetta sæst týðuliga aftur á føroysku vegunum, har tað alsamt styttist millum betru týsku bilamerkini.

Fyritøkur, ið liva av at innflyta brúktar bilar, spríkja upp, meðan summar av bilasølunum hyggja við skeptiskum eygum at nýggju, brúktu, bilunum, ið hava slitið síni barnadekk á týsku motorvegunum og nú eru komnir til Føroya á gamalsaldrinum.

Fleiri eru sólskinssøgurnar um lukkuligar bilaeigarar, og somuleiðis eru tær minni bjørtu søgurnar um týskar bilar, ið ongantíð náa at slíta nakað serligt av føroyskum asfalti, áðrenn motorurin gevur upp vegna slit.

Í greinunum á hesum síðum verður spurningur settur við, hvørjir fyrimunir og vansar eru við at keypa innfluttu brúktu bilarnar.




*JB-Bilar í Havn er ein av teimum fyritøkunum, sum hevur innflutt nógvar av teimum hundratals brúktu bilunum, sum komnir eru til Føroya úr Týsklandi síðani 1995, tá avgjaldslækkingar høvdu við sær, at tað fór at loysa seg at innflyta brúktar bilar. Fyrstu árini innfluttu JB-Bilar yvir 100 bilar um árið. Nú liggur talið um 50 bilar árliga – men nú eru tað teir dýraru bilarnir, so sum BMW, Mercedes og VW, sum verða seldir. Samstundis sum eftirspurningurin eftir brúktu, týsku bilunum er minkaður, eru fleir, sum bjóð seg fram at selja*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Bilinnflytarin: Tað ræður um at keypa frá tí rætta

**– Tað verður fuskað við kilometurteljarum og servicebókum. Tí ræður um at ansa sær, tá man keypir bilar úr Týsklandi og fara eftir regluni um, at ljóðar nakað ov gott til at vera satt, so er tað helst ikki satt, sigur Jens Pauli Dahl, ið eigur og rekur fyritøkuna JB-Bilar, sum innflytur bilar úr Týsklandi**

BRÚKTIR BILAR
*Rúnar Reistrup*

Ein tann fyritøkan, ið hevur drúgvastu royndirnar við innflutningi av týskum bilum til Føroya, er JB-Bilar. Síðan 1995, tá avgjaldslækkingar høvdu við sær, at tað fór at loysa seg at innflyta brúktar bilar úr Týsklandi, hevur fyritøkan innflutt hundraðtals bilar fyri føroyskar bilkeyparar.

Jens Pauli Dahl eigur og rekur JB-Bilar. Hann ávarar ímóti at fólk sjálvi at bíleggja sær bilar frá týskum bilasølum.

– Fara fólk sjálvi til verka og bíleggja sær ein bíligan brúktan bil um internetið ella telefon beinleiðis frá einum týskum seljara, so kunnu tey nærum vera vís í, at tey verða snýtt. Týsku seljararnir vita væl, hvat teirra brúktu bilar eru verdir, og teir lata ikki ein bil fyri minni uttan so, at har er okkurt, sum ikki ruggar rætt. Bilurin kann hava havt ein stóran skaða ella kilometurteljarin kann vera stillaður nakrar hundrað túsund kilometrar aftur. Slíkt sæst ikki á bilinum, men minkar stórliga um virðið á honum. Eg veit um fleiri, sum hava brent seg av at bíleggja sær bil sjálvi.

### Kilometurteljarin kann lúgva

Jens Pauli kann sjálvur vátta søgurnar um, at summir týskir bilseljarar flyta kilometurteljararnar á teimum bilum, sum teir selja.

»Bíleggja sær sjálvi ein bíligan brúktan bil um internetið ella telefon beinleiðis frá einum týskum seljara, so kunnu tey nærum vera vís í, at tey verða snýtt«

– Fyrstu árini eg innfutti bilar, kom tað fyri, at eg innflutti bilar, sum heilt týðuliga høvdu koyrt nógv meir enn kilometurteljarin vísti. Tað hendir tó ikki longur, tí nú keypi eg bara frá nøkrum heilt fáum seljarum, sum eg havi alla orsøk at líta á.

Tað er eingin trupulleiki at broyta kilometurteljaran, um tú hevur røttu útgerðina, og tað hava nógvir brúktbilaseljarar í Týsklandi. Tað sæst ikki á einum góðum bili at hann hevur koyrt 600.000 kilometrar á týsku motorvegunum. Hann kann síggja púra nýggjur út. Tí skal man vera øgiliga ansin og halda seg til teir røttu seljararnar, sigur Jens Pauli Dahl.

Hann ræður tí fólki til at ferðast niður til Týsklands at finna ein brúktan bil, um tey sjálvi vilja innflyta bilin.

– Ein slík ferð skal planleggjast væl áðrenn. Tað krevur rættiliga nógv arbeiði at flyta ein bil úr Týsklandi til Føroya, og tað skalt tú alt hava fyrireikað teg uppá áðrenn. Eisini er umráðandi at tú bara fert til autoriseraðar bilsølur, tí tá er vandin fyri at verða tikin við nøsini nógv minni.

### Veitir keyparum trygd

Tað eru tó tey fægstu, sum velja at ferðast allan vegin til Týsklands eftir einum bili. Tey venda sær heldur til onkra av teimum føroysku fyritøkunum, sum hava spesialiserað seg innan fyri innflutning av bilum úr Týsklandi. Og verður farið til røttu fyritøkuna, er hetta ein at kalla skotsikkur trygd ímóti at verða snýttur, sigur Jens Pauli Dahl.

– Eg haldi meg til bert at keypa bilar frá fýra ávísum seljarum í Týsklandi. Hesar havi eg handlað við í seks ár eftirhondini, og eg veit, at eg kann líta á teir, tá eg keypi ein bil frá teimum. Harafturat veiti eg øllum keyparum treytaleyst garanti ímóti øllum brekum teir fyrstu tríggjar mánaðirnar, eftir at eigarin hevur fingið bilin. Er nakað brek, so taki eg bilin aftur og hefti fyri hann, og áðrenn bilurin verður latin keyparanum er hann gjølla eftirkannaður av okkum. Soleiðis fær keyparin trygd fyri, at einki er galið við bilinum, tá hann fær hann, og tí er hetta ein nógv tryggari loysn enn um keyparin sjálvur innflytir bilin.

### Fleiri enn túsund bilar innfluttir

Eigarin av JB-Bilum metir talið á brúktum bilum, sum føroyingar hava innflutt úr Týsklandi síðan 1995, liggja oman fyri túsund. Sjálvur innflutti hann umleið hundrað bilar um árið tey fyrstu árini. Nú innflytir hann umleið 50 bilar hvørt ár. Orsøkin til at talið er minkað er partvís, at alsamt fleiri fyritøkur eru farnar undir at innflyta brúktar bilar til Føroya, og partvís at eftirspurningurin ikki er so stórur longur. Eftirspurningurin er eisini broyttur nakað hesi seinastu árini.

»Týskarar hava ein heilt annan bilmentalitet enn til dømis vit føroyingar og duga nógv betur at fara við bilum. Har er hugbururin tann, at hevur tú ráð at keypa ein góðan bil, so hevur tú eisini ráð at halda hann við líka«

– Fyrstu árini vildu fólk fyrst og fremst hava dieselbilar. Tá innfluttu vit sera nógvar Golfar og annars ymisk sløg av bilum við diesel motorum. Men hesi seinastu árini hevur størsti eftirspurningurin verið eftir teimum meira eksklusivu týsku bilunum so sum BMW, Mercedes. og teimum betru VW modellunum. Og meðan viðskiftafólkini fyrr vóru fólk av øllum slag, so eru tað nú mest fólk, sum tjena væl, ið bíleggja sær bil. Ofta eru tað yngri sjómenn.

### Týskarar fara væl um

Jens Pauli Dahl hevur eina greiða meining um, hví brúktir týskir bilar eru so nógv eftirspurdir í Føroyum.

– Brúktir týskir bilar eru, so at siga uttan undantak ógvuliga væl hildnir. Týskarar hava ein heilt annan bilmentalitet enn til dømis vit føroyingar og duga nógv betur at fara við bilum. Har er hugbururin tann, at hevur tú ráð at keypa ein góðan bil, so hevur tú eisini ráð at halda hann við líka og koyra hann á verkstað til oljuskift og serviceeftirlit. Tað er fyri mær at síggja tann størsti fyrimunurin við at innflyta brúkta bilin úr Týsklandi. Tað er ikki altíð bíligari at innflyta ein brúktan bil enn at keypa ein tilsvarandi bil í Føroyum, men tann innflutti bilurin er í nógv betri standi enn bilurin, sum hevur koyrt øll síni ár í Føroyum, sigur Jens Pauli Dahl, ið bert keypir bilar úr Týsklandi.

– Nakrir keypa eisini bilar úr Belgia og Sveits, men har hava bilarnir koyrt á verri vegum og eru eftir mínum tykki ofta ikki eins væl hildnir sum teir týsku bilarir.

Jens Pauli Dahl hevur ta fatan, at viðskiftafólk hansara eru glað fyri sínar innfluttu bilar, og fleiri hava longu bílagt sær bil frá JB-Bilum á øðrum sinni.

Men á summum av landsins bilasølum eru tey ikki so fegin um stóra innflutningin av brúktum bilum til landið, tí hetta minkar sjálvsagt um søluna av nýggjum bilunum.

– Summar bilasølur vilja treyðugt taka týsku bilarnar inn á verkstøðini, men eg haldi, at hesin trupulleikin er í minking nú verkstøðini hava sæð, at tey kunnu fáa rættiliga fitt burturúr at servisera teir nógvu innfluttu bilarnar, sigur Jens Pauli Dahl, ið eigur og rekur JB-Bilar.

gult13 cyan13 magenta13 svart13



# Bilasølan: Summir eru niðurslitnir

**- Ert tú heppin ber til at gera kvetti. Ert tú minni heppin kanst tú standa við einum innfluttum bili, sum ikki er helvtina av keypsprísinum verdur. Tí ráða vit til heldur at velja tryggu loysnina og keypa ein bil, sum hevur koyrt í Føroyum, sigur Jákup Olsen, sølumaður á Bilfríðkuni**

BRÚKTIR BILAR
*Rúnar Reistrup*

Á Bilfríðkuni í Havn, ið millum annað selur BMW bilar, ávara tey fólk um teir vansar, sum eru við at keypa innfluttu bilarnar.

– Summi av teimum, sum keypa ein innfluttan bil, gera rættiligt kvetti. Eingin ivi um tað. Men tey minni hepnu keypa ein bil sum vísir seg at vera niðurslitin. Tí er tað neyðugt, at fólk eru tilvitað um tann vandan, sum liggur í at keypa ein bil beinleiðis úr Týsklandi. Tú kanst ongantíð vera vísur í, hvat tú fært. Vit hava sæð nakrar av óhepnu keyparunum á verkstaðnum hjá okkum, sigur Jákup Olsen, sølumaður á Bilfríðkuni.

Ein BMW bilur verður mettur at eiga at kunna koyra 800.000 kilometrar eftir góðum vegi, uttan at fáa trupulleikar við motorinum. Teir bilarnir, ið verða innfluttir til Føroya hava sjáldan koyrt serliga nógv og áttu tí at havt nógvar kilometrar eftir í sær.

– Men onkuntíð hava vit sæð bilar, har kilometurteljarin bara stendur á 100.000, men har motorurin týðuliga er niðurslitin. Við røttu útgerðini ber til at broyta kilometratalið á kilometurteljaranum, og tað verður gjørt, sigur Jákup Olsen.

### Innflytararnir eru erligir

Hann hevur tó ongan illgruna um, at føroysku bilainnflytararnir ikki eru reellir. Hann er ikki í iva um, at teir royna at innflyta teir best viðfarnu bilarnar. Tað er hvat hendir við bilinum, áðrenn teir verða seldir til føroysku innflutningsfyritøkurnar, sum í summum førum kann vera ivasamt.

»Ofta skal eigarin hava verið onkur gomul kona, sum bara hevur brúkt bilin til sunnudagstúrar. Tá so umtalaði bilurin hevur 17 tumma sportfelgur og tónaðar rútar, kann man av røttum fara at ivast í, um alt ruggar rætt við søguni hjá seljaranum«

– Tað er ofta sama søga man fær um fortíðina hjá teimum ymisku bilunum. Oftast hava teir bara havt ein eigara, og ofta skal hetta vera onkur gomul kona, sum bara hevur brúkt bilin til sunnudagstúrar. Tí vísir kilometurteljarin ikki meir enn 100.000 kilometrar á seks ára gamla bilinum, fær man at vita. Tá so umtalaði bilurin hevur 17 tumma sportfelgur og tónaðar rútar, kann man av røttum byrja at ivast í, um alt ruggar rætt við søguni hjá seljaranum, nevnir sølumaðurin á Bilfríðkuni sum dømi.

Í Týsklandi, haðani flestu av innfluttu bilinum koma, er vanligt at fólk koyra í bili langt millum heim og arbeiðspláss og ofta fara langar túrar ígjøgnum Europa við bilinum. Og á týsku motorvegunum har ein góður BMW, Mercedes ella Volkswagen lættliga kann koyra 200 kilometrar um tíman er skjótt at kilometrar leggjast aftur at teljaranum.

– Tú sært ikki á einum góðum bili, at hann hevur koyrt kanska 600.000 kilometrar á týsku motorvegunum. Hann sær væl út, hevur ongan rust, men motorurin kann vera niðurslitin. Og tá ein slitin motorur knappliga skal brúkast til at koyra niðan ígjøgnum tær føroysku brekkurnar, so er skjótt at tað gevur trupulleikar.

### Føroysku bilarnir fáa hægri prís

Bilfríðkan hevur selt støðugt flkeiri bilar seinnu árini, og grundað á tað metir Jákup Olsen ikki, at stóri innflutningurin av millum øðrum BMW bilum seinnu árini hevur ávirkað søluna av nýggjum bilum.

– Har er tíbetur rættiliga stórur munur á einum nýggjum BMW samanborið við ein seks ára gamlan. Og tí velja tey, sum hava ráð til tað, at keypa sær nýggja modellið.

Á Bilfríðkuni hava tey onkuntíð tikið brúktar týskar bilar inn í býti, tá fólk hava keypt nýggjan bil. Men bilasølan letur væl lægri prís fyri innfluttar bilar enn fyri bilar, ið hava koyrt allar sínar kilometrar í Føroyum, og tí velja tey flestu sjálvi at selja bilarnar.

– Vit kunnu ikki lata sama prís fyri ein bil, sum vit ikki kenna søguna hjá sum fyri ein bil, sum vit sjálvi hava selt. Tann kjansin eru vit ikki til reiðar at taka.

Hann skilir tó væl, at tey, sum eru til reiðar, taka hendan kjans.

– Eg vil ikki beinleiðis ráða fólki frá at keypa sær ein innfluttan bil. Men tey skulu vera varug við teir vansarnar, sum hetta inniber, og eg vil sjálvsagt heldur ráða fólki til at keypa ein bil frá okkum, sum hevur koyrt øll síni ár í Føroyum, tí tá vita vit, hvørja søgu bilurin hevur – um hann hevur havt nakran skaða, hevur yvirhildið serviceeftirlitini, og hvørjar eigarar hann hevur havt, sigur Jákup Olsen sølumaður á Bilfríðkuni.

# Bileftirlitið: Bilarnir eru í góðum standi

**Innfluttu bilarnir úr Týsklandi verða sýnaðir á Bileftirlitinum. Her hava tey tí sæð allar bilarnar, og sum heild er talan um góðar bilar, sigur Búgvi Apol, sýnsmaður á Bileftirlitinum**

BRÚKTIR BILAR
*Rúnar Reistrup*

Teir flestu brúktu bilarnir, sum verða innfluttir úr Týsklandi og harumleiðir, eru í góðum standi. Teir eru sum heild lítið rustaðir í mun til javnaldrandi bilar, ið hava koyrt øll síni ár í Føroyum. Tað sigur Búgvi Apol, sýnsmaður á Bileftirlitinum, har allir teir brúktu innfluttu bilarnir verða sýnaðir, áðrenn teir koma á føroysku vegirnar.

»Út frá sýnskanningunum kunnu vit bara konstatera at bilarnir eru rættiliga góðir«

Av tí sama fáa bilarnir sjáldan meira enn nakrar fáar krossar í sýnsfrágreiðingini og krevja tí ikki stórvegis ábøtur.

Men á Bileftirlitium siga tey, at hetta kortini ikki er nøkur trygd fyri, at motorurin á bilinum ikki er slitin, tí ein sýnskanning umfatar ikki motorslit.

– Man hoyrir søgurnar um, at kilometurteljarar í summum førum verða stillaðir av bilseljarum í Týsklandi, men vit hava ikki nakra hóming av, um hetta er framt á týsku bilunum, sum vit sýna. Út frá sýnskanningunum kunnu vit bara konstatera, at bilarnir eru rættiliga góðir, sigur Búgvi Apol, sýnsmaður.

Bileftirlitið sær tað ikki sum nakran veruligan trupulleika fyri trygdina á føroysku vegunum, at so nógvir brúktir bilar verða innfluttir, men vísir kortini á, at gamlir bilar ikki eru gjørdir eftir somu trygdarreglum sum nýggju bilarnir.

– Tú fært ikki ein seks ára gamlan bil, ið lýkur somu trygdarkrøv, sum einum nýggjur bilur skal lúka. So sæð frá einum trygdarsjónarhorni, hevði tað prinsipielt sæð verið betri, um fólk heldur keyptu nýggjar bilar, sigur Búgvi Apol, sum tó leggur dent á at hervið er ikki sagt, at eldru bilarnir eru vandamiklir.

– Men tess nýggjari bilparkin er, tess hægri er trygdarstandardurin. Og tað sigur seg sjálvt, at tað vera lutfalsliga fleiri gamlir og hálvgamlir bilar í bilparkini, um fólk velja at innflyta gamlar bilar heldur enn at keypa nýggjar. So sæð frá tí sjónarhorninum hevði tað verið betri, um fólk keyptu nýggjar bilar, sigur Búgvi Apol, sýnsmaður á Bileftirlitinum.